tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Løgmaður til Brússel at samráðast

## *Oddagrein*

Í mai mánað í ár fer Anfinn Kallsberg, løgmaður á vitjan á ES-høvuðsborgini í Brussel. Sambart Degi og Viku í farnu viku fer løgmaður til Brussel at samráðast um eina nýggja avtalu fyri Føroyar. Henda avtalan skal so avloysa verandi handilsavtalu umframt at knýta onnur viðurskifti uppí, sum í dag ikki eru partur av handilsavtaluni. Her verður so eisini komið inn á tey fýra frælsini í ES, sum umfata vørur og tænstur, kapital, útbúgving og arbeiðsmegi.

SPURNINGURIN um tilknýti okkara til ES er afturvendandi og viðgjørdi løgmaður hann í frágreiðing síni herfyri um uttanríkismál. Løgmaður segði m.a. tá, at landsstýrið hevur slept ætlanini at fáa eina EBS-líknandi avtalu við ES, soleiðis sum eitt nú Noreg hevur. Heldur leggja Føroyar seg eftir at fáa eina víðkaða handilsavtalu við ES, og tað er í hesum sambandi, at løgmaður ætlar sær til Brussel at hitta Romano Prodi, oddamannin í ES umframt fleiri av hansara næstu monnum. Her er serstakliga talan um teir kommiserar, sum hava ábyrgdina av økjum, sum verða innihildin í eini avtalu millum Føroyar og ES.

EITT av málunum, sum løgmaður náttúrliga kemur at viðgera, tá hann fer at hitta ES-leiðarar er spurningurin um tey krøv, sum verða sett føroyingum í eini møguligari víðkaðari avtalu. Í hesum sambandi varð nevnt í Degi og Viku spurningurin um lógarkrøv okkara til útlendsk oljufeløg, at allar vørur og tænastur í eini komandi oljuvinnu skulu um føroyskan keikant o.a. í hesum sambandi. Sambart ES-direktivi kunnu limalond í ES ella lond, sum ES hevur gjørt eitt nú EBS-avtalur við, ikki favorisera sínar egnu fyritøkur, men talan skal vera um heilt fría kapping. Soleingi Føroyar ikki eru limir í ES ella hava nakra EBS-avtalu standa vit rættiliga frítt í spurningum, sum hava við eina komandi oljuvinnu at gera.

LØGMAÐUR sigur seg vera greiðan yvir hetta málið og fer sjálvandi at fyrihalda seg til tað, tá samráðingar verða. Støðan er tann, at tað stendur í lógini, at alt virksemi skal um føroyska keikant, og tá ger tú mun á føroyskum og útlendskum. Tvs. at útgerðarhavnir so sum Aberdeen, Stavanger, Peterhead ol. vera ikki á jøvnum føti í kappingini fyri bert at nevna eitt.

TAÐ er greitt, at løgmaður hevur til uppgávu at tryggja okkara høvuðsvinnu, fiskivinnuni best sømilig kor og her ikki minst í teimum avtalum, sum vit hava við ES. Tá má ein komandi oljuvinnu koma í aðru røð. Men hinvegin er tað so ein sannroynd, at tingið hevur samtykt við lóg, at vørur og tænatur í komandi oljuvirksemi skulu yvir føroyskan keikant. Nú vit fara at seta spónin í oljuleitingina og henda nýggja lóg sleppur at royna seg, kann sjálvandi vera spurt, hvussu væl timingin er at taka hetta málið fram nú. Hetta er uttan iva nakað, sum løgmaður hevur við í sínum metingum.Og hvussu er er tað eitt sindur ringt at gjøgnumskoða, hvat løgmaður hevur í kvittanum. Hóast tímingin kann tykjast løgin, so vil ein møgulig broyting í hesi lóg tó neyvan fáa nakran týdning enn. Tvs. at vit fara helst at bjóða ágóðan av hesi lógini um keikantin í nøkur ár.Vit seta annars álit okkara á løgmann, at hann fer at fáa Føroyum eina góða avtalu við ES.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Fullveldissamráðingarnar

Tað er einki at ivast í, at samráðingarnar, sum skulu førast í næsta mánaða og eina tíð framyvir millum landsstýrið og donsku stjórnina um nýggja stjórnarskipan fyri Føroyar, hava stóran týdning fyri land og fólk.



Til at føra hesar samráðingar okkara vegna hava vit stjórn okkara, Føroya Landsstýri. Landsstýrið er grundað á samansetingina av Føroya Løgtingi. Tey, ið manna landsstýrið og løgtingið hava sostatt ábyrgdina av, at sjónarmið føroyinga verða løgd fram og vard so væl sum møguligt.

Sjónarmiðini eru í høvuðsheitum niðurfeld í løgtingssamtykt, og út frá hesi løgtingssamtykt hevur landsstýrið gjørt eitt upprit, sum uttanlandsnevndin hevur fingið til ummælis, áðrenn landsstýrið fer til samráðingarborðið. Hetta er alt eftir bókini og eftir rættari mannagongd.

Tá ið uttanlandsnevndin hevur handað landsstýrinum sítt tilmæli ella álit vita landsstýrisins samráðingarfólk, hvørjar politiskar heimildir teir hava. Tí teir kunnu taka fyri givið, at politisku umboðini í uttanlandsnevndini binda sínar floksfelagar í tinginum. Tað er tí ikki avgerandi, um flokkar hava ein ella tveir limir í hesi nevnd. Einki er at ivast í, at tilmæli frá samgongulimunum í nevndini verður at teir geva landsstýrinum heimildir at samráðast um eina skipan, sum svarar til løgtingssamtyktina og uppritið. Væntandi og vónandi mælir Miðflokkurin eisini til, at landsstýrið fær fríar hendur at samráða seg til eina góða og gagnliga loysn.

Hinvegin er ivasamt, hvat tilmæli Javnaðarflokkurin kemur við. Politiska gongdin síðani seinasta val hevur tíverri verið tann, at flokkurin hevur ikki sagt tað, sum hann meinar ella helst, at hann ikki hevur meinað tað, sum hann sigur. Beint eftir, at landsstýrið varð skipað, kunngjørdi flokkurin, at hann kundi taka undir við fyrstu síðu í samgonguskjalinum. Áðrenn valið varð flokkurin ógvuliga áhugaður í íslendsku skipanini frá 1918. Men nú hesar ætlanir eru við at gerast veruleiki, kunngerð Javnaðarflokkurin, at hann brýtur allar brýr til samgonguflokkarnar og »fer ikki at nýta meira tíð og orku uppá at viðgera fullveldisuppskotið hjá samgonguni«. (citat Sosialurin 22.2.2000).

Men samstundis sum hesin flokkur gevur skarvin yvir samtykkir hann á eyka landsfundi:

1. Verandi støða er ógreið og **tryggjar ikki** nóg væl føroyskt sjálvræði
2. At vit skulu hava nýggja skipan við **altjóðarættligum sáttmála** millum Føroya og Danmark.
3. At ríkisfelagsskapurin er grundaður á sáttmála millum **tvær sjálvstøðugar tjóðir**
4. At Føroya Løgting, sum umboð fyri Føroya fólk, er **evsta vald á øllum málsøkjum,** sum eru yvirtikin
5. At **eingin avmarking** er fyri, hvørji **mál og málsøki kunnu koma undir føroyskt ræði.**

Alt hetta er við í tí, sum landsstýrið arbeiðir fyri, og sum løgtingið hevur samtykt. Sannlíkt er væl eisini, at tað er við í landsstýrisins uppriti. Einasta frávik er, at Javnaðarflokkurin brúkar orðið ríkisfelagsskapur, meðan landsstýrið brúkar orðið fullveldi (ella okkurt líknandi, kanska nýveldi). Men hugsanin hjá báðum pørtum er væl tann, sum eisini verður sagt í samtyktini hjá Javnaðarflokkinum, at talan er um **sjálvstøðugar tjóðir.** Føroyar eru ongantíð innlimaðar í danska ríkið, sum ein partur av hesum. Føroyar eru eitt land, eitt fólk og ein tjóð, sum hevur verið undir danakongi síðani1380, men ikki sum ein partur av danska ríkinum. Tí kann talan ongantíð vera um **ríkisfelagsskap,** men hinvegin kunnu vit við sáttmála klárgera spurningin um **ríkjafelagsskap.** Tað vil siga ein sáttmála millum tvey ríki, tvey lond, tvey fólk ella tvær tjóðir **á líka føti.** Tað er tað, spurningurin snýr seg um.

Landsstýrið sigur greitt, at teir vilja avgreiða hesa støðuna. Javnaðarflokkurin sigur í orðum, at hann vil gera tað sama. Men í gerðum vil hann ikki.

Í politikki roynir ein at fáa og útinna ávirkan. Menn og flokkar, sum ikki tora, ikki gera sær støðuna og málsetningarnar nóg greiðar, sum spæla firtnir, sum rýma av fundi og uppføra seg óbúgvi, kunnu ikki rokna við at fáa ávirkan.

Tá verða tað hinir, sum arbeiða við málinum fyri eyga, sum eisini síggja úrslitini tá av tornar.

**Jógvan Sundstein**

# Musikkskúli í Oyndarfirði

Hin minsti musikkskúlin í landinum liggur í Oyndarfirði, men hóast tey bert hava tveir tímar um vikuna, so læra níggju næmingar at spæla messingljóðføri.

Tey eiga rættiliga nýggj ljóðføri í bygdini, og hvønn týsdag vitjar musikkskúlalærarin Atli Petersen teir hugagóðu næmingarnar, og bygdaráðið sær virði í hesum.



*Ljómurin var óførur tá ið næmingar av Skálafjørðinum vóru í Oyndafirði seinasta týsdag*

### Samanspæl millum plássini

Av tí at musikkskúlarnir í Eysturoynni eru nógvir og smáir, varð seinasta týsdag ein verkætlan sett í gongd, har næmingar runt fjørðin, av Strondum, Skála, Tofum, Runavík, Glyvrum og úr Oyndarfirði hittust í samanspæli.

Ætlan er løgd soleiðis at tiltakið flytur og samanspæl verður einaferð á hvørjum plássi, fyri at enda við saman við hornorkestrinum á Skálafjørðinum, sum kallast Nes Sóknar Musikkfelag.

Musikkskúlin á Skála er komin aftur á føtur og skúlastjórin Súni Kristiansen, sum eisini leiðir musikkskúlan á Skála, hevur fingur við í spælinum, tá ið ræður um at samskipa hesar venjingar.



# Bløðini kunnu verða dýrur smeitur

*Fara Dimmalætting og Sosialurin sjálvi at bera bløðini og addressuleyst tilfar út, kann hetta føra til, at Postverkið missir um 8 milliónir um árið. Í ringasta føri verður talan um uppsagnir*

JOHN JOHANNESSEN

Verða tað bløðini sjálvi, sum framyvir fara at bera Dimmalætting, Sosialin og lýsingabløð út til húsarhaldini, fer hetta at føra til álvarsligar avleiðingar fyri Postverk Føroya.

Hetta ásannar Bergur í Garði, postverkstjóri, nú tað er vorðið greitt, at tey bæði stóru bløðini, Dimmalætting og Sosialurin, ætla sær at samstarva um at gera eitt felag, ið skal bera bløð teirra út allar dagar í vikuni.

Bløðini bæði siga seg tó ynskja, at Postverkið framhaldandi skal bera bløðini út, men so skal hetta vera um kvøldið og fyri ein sámuligan penga. Arbeitt hevur verið við at gjørt slíka avtalu millum bløðini bæði, Postverk Føroya og Føroya Postfelag, ið er fakfelagið hjá postboðunum, men líkt er ikki til, at semja finst millum hesar tríggjar partar.

### Reglur og karmar skulu haldast

Á aðalfundinum hjá Føroya Postfelag um vikuskiftið varð júst hetta málið viðgjørt, og samdust fundarluttakararnir í hesum sambandi um eina yvirlýsing.

Í yvirlýsingini stendur, at limir felagsins ikki kunnu góðtaka, at málið í útvarpi og bløðunum verður lagt út soleiðis, sum um tað eru starvsfókini í postverkinum, ið eru ein forðing fyri, at postverkið kann geva bløðunum eitt tilboð upp á at bera bløðini út um kvøldið.

Eisini siga postfólkini í yvirlýsingini, at tað fyrst og fremst má standa upp til leiðslu postverksins, um hon metir, at útberingin ber til innan teir karmar og reglur, sum eru galdandi fyri arbeiðsplássið.

Hesir karmar eru, sambært Sunnleivi Højgaard, nývalda formanninum í Føroya Postfelag, at postboðini skulu fáa ávísar viðbøtur, skulu tey bera post út um kvøldaranar.

Formaðurin í postfelagnum leggur dent á, at talan ikki er um beinleiðis yvirtíð, men um eina væl uppiborna viðbót fyri at arbeiða hesa óvanligu arbeiðstíð, sum slík útbering hevur við sær.

Sunnleivur Højgaard leggur tó dent á, at hetta ikki skal fatast sum nakar illvilji frá postboðunum. Men talan ikki er um annað enn rímulig krøv.

### Sáttmáli er sáttmáli

Bergur í Garði, postverksstjóri, sigur seg ikki kunna gera annað enn at virða sáttmálan við postfelagið. Hann sigur seg hava fingið greið boð frá posfelagnum um, at felagið ikki fer at eina semju, ið liggur uttan fyri sáttmálan hjá postfólkunum.

– Hetta merkir, at tað verður trupult hjá okkum at fáa eina útbering, sum fer at loysa seg, upp at standa, sigur Bergur í Garði.

Postverksstjórin ásannar, at ber ikki til at bera bløðini út, fer hetta at merkja eitt stórt tap fyri Postverkið, og kann hetta tap í seinasta enda føra til uppsagnir.

Postverk Føroya fær um fýra milliónir um árið fyri at bera bløðini út, og inntøkan av øðrum addressuleysum posti er, sambært postverksstjóranum, nøkulunda tann sama.



# »Norðborg« liggur

Sunnudagin skuldi »Norðborg« (fyrrv. »Gardar«) fara avstað á fyrsta túrin, men fóðringin fór á maskinuni, so »Norðborg« slapp ongan veg. Føroyska manningin var øll kom yvir leygardagin, og við verða 28 mans, harav 9 eru norðmenn. Tað hevur ikki verið gjørligt at fingið at vita, hvussu umfatandi brekið er og nær »Norðborg« verður klárur at fara til fiskiskap, men av reiðarínum verður sagt, at gekst eftir ætlan, skuldi royndartúrur gerast aftur í gjár. Roynt var at fáa samband við skiparan, Kristian Martin Rasmussen, men hoyrilíkindi vóru ikki til tess, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Heimsins fittasti drongur

JOHN JOHANNESSEN

– Hetta er uttan iva heimsins fittasta barn.

Orðini eigur tingkvinnan, Annita á Fríðriksmørk, sum leygardagin saman við manni sínum, Pálli Olsen, fekk sítt fyrsta barn.

Barnið er ein vælskaptur drongur, ið vigar 7 pund og er 53 cm langur. Hann kom í heimin leygardagin við keisaraskurði. Keisaraskurðurin gekk væl, og bæði mamma og barn hava tað gott.



Annita og lítli drongurin sleppa væntandi heim fyrsta dagin. Og, sum skilst á Annitu, stúrir hon ikki fyri vøkunætum uppi yvir tí lítla.

– Hann er so fittur og fríðarligur, at hann valla fær verið fríðarligari, sigur glaða mamman, ið fyribils ikki verður at hoyra á tingsins røðarapalli.



Heimurin broytist hvønn tann einasta dag. Tí mást tú gera teg til reiðar at fylgja við.
Handilsskúlin hevur alla ta nýggjastu kunningartøknina og brynjar teg til framtíðina. Uttan mun til um tú eftir Handilsskúlan velur eina hægri útbúgving sum t.d. løgfrøði ella búskaparfrøði ella fert beinleiðis út í vinnulívið. Uttan mun til um tú velur FHS ella Hægri Handilsskúla.

Handilsskúlin gevur tær **bæði** møguleika fyri framhaldslestri **og** vinnuførleika.

Ring til okkara ella støkk inn á gólvið, um tú vilt vita meira um Handilsskúlan.
Seinasta freist at tekna seg til Handilsskúlan er 15. mars

**Hví taka annað, tá tú kanst fáa bæði?**

FØROYA HANDILSSKÚLI
Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn, Tel 31 71 77
Kambsdalur, 530 Fuglafjørður, Tel 44 49 00

www • team 85 • fo